# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg segði alla tíðina, at bleiv eg ikki valevni, var John McCain tann besti, sum vit kundu stilla upp*

*(Mike Huckabee)*

# Bush hartaði arabiskar leiðarar

**Amerikanski forsetin legði ikki fingrarnar ímillum, tá hann í einari røðu í gjár hartaði fleiri arabiskar leiðarar uttan tó at nevna teir við navni**




*George W. Bush: - Í Miðeystri eru ov mong dømi um, at andstøðan situr í fongsli. Tann tíðin er farin*

- Í Miðeystri hava vit alt ov ofta sæð dømi um, at landið hevur ein leiðara, og at andstøðan situr í fongsli. Tíðin er farin frá hesari mannagongdini, og í framtíðini eiga lond í Miðeystri at virða sítt fólk, segði George W. Bush í røðu síni altjóða búskaparfundinum í egyptiska frítíðarbýnum Sharm el-Sheik.

Hann nevndi ongan leiðara við navni, men politiskir eygleiðarar siga, at atfinningarnar uttan iva eisini vóru ætlaðar egyptisku leiðsluni, sum er kend fyri at kúga andstøðuna við at seta fleiri av hennara leiðarum í fongsul. Egyptiski íløguráðharrin, Mahmud Mohiedin, vildi ikki gera beinleiðis viðmerkingar til orðini hjá Bush.

- Tað er umráðandi, at mál viðvíkjandi politiskum frælsi verða handfarin á ein tílíkan hátt og við einari hóskandi ferð, so tað ikki órógvar samfelagið. Tað er eftir mínum tykki vegurin til demokrati, segði ráðharrin við tíðindafólk aftan á røðuna hjá Bush.

Hóast amerikanski forsetin ikki nevndi nakran arabiskan leiðara við navni, duldi hann ikki fyri, at hansara atfinningar vóru serliga vendar ímóti leiðarunum í Iran og Sýrialandi.

- Londini í Miðeystri eiga at venda sær frá ríkjum sum Iran og Sýrialand, tí tey forða fyri framburði, segði forsetin og vísti harafturímóti á lond sum Turkaland, Jordan, Marokko, Irak og Afghanistan sum góðar fyrimyndir.

## Palestinar illir

Á ferðini í Miðeystri vitjaði amerikanski forsetin eisini Ísrael og Saudiarabia. Í Ísrael var hann boðin at halda røðu í tjóðartinginum í sambandi við, at ísraelska ríkið helt sín 60 ára dag, men palestinar vóru alt annað enn fegnir um innihaldið í røðuni. Í teirra eygum var røðan ein treytaleys stuðulsváttan til Ísrael, sama hvat landið ger.

- Amerikanararnir skulu ikki tingast okkara vegna. Vit krevja bara, at teir skulu viðurkenna okkara støðu og rættindi, sigur palestinski forsetin, Mahmoud Abbas, við Reuters.

# Danski fíggjarmálaráðharrin trongdur

**Lars Løkke Rasmussen skal nú greiða frá, hví hann leigaði hýruvognar fyri 148.000 krónur, sum hann fekk endurrindað, meðan hann var amtborgarstjóri**



*Lars Løkke Rasmussen hevur verið fyri hørðum ákoyringum í seinastuni*

*Mynd: Polfoto*

Sum amtborgarstjóri kundi Lars Løkke Rasmussen leiga hýruvogn, um hann skuldi ørindi fyri amtið, men sjónvarpið hjá danska kringvarpinum skjalprógvaði í gjárkvøldið, at Lars Løkke Rasmussen fekk endurrindaðar 148.000 krónur fyri hýruvognaleigu krónur uttan at viðmerkja, hvar hann hevði verið, ella um ferðin hevði nakað við arbeiði hansara at gera.

Tveir fyrrverandi limir í amtsráðnum í Frederiksborg, har Lars Løkke Rasmussen var borgarstjóri, siga við DR, at so lagaligar treytir høvdu teir ikki tey árini, teir sótu í ráðnum.

- Tók eg ein hýruvogn, skuldi eg viðmerkja, hví eg hevði leigað hann, sigur Finn Hansen, sum var konservativt umboð í amtsráðnum.

Serfrøðingar, sum DR hevur tosað við, siga, at kann fíggjarmálaráðharrin ikki prógva, at hann leigaði hýruvogn í sambandi við arbeiði sítt, eigur hann at rinda pengarnar aftur.

Danski Fólkaflokkurin hevur biðið ráðharran greiða frá málinum.

## STUTT SAGT

### Ófriður í Johannesburg

Ta seinastu vikuna hava samanbrestir verið millum innflytarar og harkalið í býarpartinum Alexandra í suðurafrikanska býnum Johannesburg. Higartil hava fimm fólk latið lív í samanbrestunum, og meiri enn 50 onnur eru endað á sjúkrahúsi við skotsárum ella knívsstungum, skrivar Reuters.

Løgreglan í Johannesburg sigur, at ófriðurin stendst av ágangi ímóti innflytarum úr Zimbabwe, Mozambik og Malawi, sum leita sær til Suðurafrika í vónini um at fáa okkurt arbeiði. Fyrrverandi suðurafrikanski forsetin Nelson Mandela hevur biðið suðurafrikanska fólkið venda áganginum ímóti innflytarunum bakið.

### Stórar slangur í Florida



*Nógvar av kvalaraslangunum í Florida eru úr Burma*

*Mynd: Vísir*

Í Florida eru myndugleikarnir komnir í rasshaft av ovurstórum kvalaraslangum, sum fólk hava flutt inn úr Landssynningsasia. Í fjølmiðlunum verður sagt frá, at slangur av hesum slagnum hava etið hundar, og at onkur teirra hevur roynt at fáa eina heila krokodillu niðurum. Myndugleikarnir siga, at árini frá 2002 til 2005 vórðu 201 kvalaraslangur funnar og avlívaðar, men tey bæði seinastu árini er talið vaksið aftur, so nú eru tær meiri enn 400 í tali. Tann største, sum er funnin, var fimm metrar long og vigaði 140 pund.